# Nýtt tilfar skal forða ferðsluvanlukkum

**Nú verður lættari hjá lærarum og foreldrum at læra børnini um vandarnar í ferðsluni. Nýtt og umfatandi undirvísingartilfar er gjørt og liggur talgilt á føroyska undirvísingarportalinum Snar**

Rannvá G. Fossaberg

Tað er blivið munandi lættari hjá lærarum og foreldrum at læra børnum í fólkaskúlanum um vandarnir í ferðsluni. Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur saman við Námi og Tryggingarfelagnum Føroyar framleitt nýtt undirvísingartilfar til fólkaskúlanæmingar, sum er at finna á undirvísingarportalinum snar.fo.

Brynhild Høgnadóttir frá Ferðslutrygd er ikki í iva um, at nýtt og dagført undirvísingartilfar hevur stóran týdning, tá børn skulu læra at bera seg rætt at í ferðslu.

– Tilfarið, ið hevur verið nýtt í ferðsluundirvísingini higartil, er alt ov gamalt, og dagført undirvísingartilfar hevur leingi manglað. Í Danmark eru kanningar gjørdar, sum vísa, at nýtt tilfar ger stóran mun og hevur ávirkan á sjálva undirvísingina, og eisini hvussu børnini taka ímóti boðskapinum, sigur Brynhild Høgnadóttir.

Í fjør varð farið undir verkætlanina at framleiða nýtt undirvísingartilfar. Tilfarið til ferðsluundirvísingina er serliga lagt til rættis við íblástri úr tilfarinum, sum tey brúka í Danmark og Svøríki.

– Vit hava kannað, hvussu tey gera við ferðsluundirvísing í grannalondunum, og á tí økinum er tað serstakliga londini Danmark og Norra, sum hava nógv nýtt, gott og talgilt tilfar, sum tey so nýta til fólkaskúlanæmingarnar har, sigur Brynhild Høgnadóttir og leggur afturat:

– Tað, sum vit síðani hava gjørt, er at umseta útlendska tilfarið og ikki minst tillaga tað til føroysk viðurskifti, millum annað við at tosa við løgregluna og onnur, ið kenna til ferðsluviðurskiftini her í Føroyum, sigur Brynhild Høgnadóttir.



*Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur í samstarvi við Nám og Tryggingarfelagið Føroyar framleitt nýtt tilfar til ferðsluundirvísingina í fólkaskúlanum. Á myndini síggjast frá vinstru Regin Hammer, stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar, Brynhild Høgnadóttir frá Ferðslutrygd, Bjørn Kallsø, landsstýrismaður í skúlamálum og Magnus Tausen, stjóri í Nám*

## Ung í stórum vandabólki

Hagtøl frá Ferðslutrygd vísa, at tað serliga eru tey ungu í aldurbólkinum 15 til 25, ið eru tann stóra avbjóðingin, hvat ferðsluvanlukkum viðvíkur. Higartil hevur størstur dentur verið lagdur á at læra næmingar í 1. til 3. flokk um vandarnar í ferðslu, men við nýggja undirvísingartilfarinum er lættari at røkka teimum eldru næmingunum.

– Tað vanliga hevur verið, at ferðsla er nakað, ið næmingarnir læra um í lærugreinini heimstaðarlæru, sum tey hava trý tey fyrstu árini í fólkaskúlanum. Men tað vísir seg, at tað er, tá børnini eru eldri, og eitt nú biltúrar og prutl eru vanligur partur av gerandisdegnum, at hesi ungu síggjast aftur í deyðshagtølunum. Júst tí hava vit valt eisini at leggja dent á relevant undirvísingartilfar til tey eldru skúlabørnini, umframt at nógv gott eisini er at finna á undirvísingarportalinum til teir yngru skúlanæmingarnar, sigur Brynhild Høgnadóttir.

## Foreldur stóra ávirkan

Sum nakað nýtt tryggjar nýggja ferðslusíðan á undirvísingarportalinum Snar, at tað verður lættari hjá foreldrum at læra børnini um at ferðast í ferðslu og teir vandarnir, sum kunnu standast av skeivum atburði í ferðsluni.

– Vit hava gjørt eina undirsíðu, ið er ætlað foreldrum, og tað er av tí orsøk, at foreldrini og teirra hugburður hevur størri ávirkan á børnini, enn hvat foreldrini ofta geva sær far um, sigur Brynhild Høgnadóttir og heldur fram:

– Kanningar vísa, at foreldrini eru týdningarmiklast, tá tað snýr seg um atferðina hjá børnunum, og hóast foreldur ikki altíð hava varhugan av, at børnini og tey ungu lurta eftir tí, ið verður sagt, so blíva tey í stóran mun ávirkað av atburðinum hjá teimum vaksnu í ferðsluni. Tí er eisini umráðandi, at tú sum foreldur veitst, hvussu tú skal bera teg at í ferðsluni og harvið kanst læra barnið um ferðslutrygd, greiðir Brynhild Høgnadóttir frá.

rannva@sosialurin.fo

***Nýggja undirvísingartilfarið um ferðslu kann síggjast á snar.fo/ferdsla***




*Nýggja tilfarið um ferðslu er at finna á eini undirsíðu á undirvísingarportalinum Snar – snar.fo/ferdsla*